# Info til leiðarar og ISTarar

## Info til ISTarar:

Sum ISTari á hesum fyrsta spennandi Nordic Adventure Race í Føroyum verður tú ein partur av tí stóra norðurlendska felagsskapinum og verður vónandi fleiri góðar upplivingar ríkari.

Sum ISTari fært tú ymiskar fyrifallandi uppgávur, sum t.d. at hjálpa við postarenningum og øðrum praktiskum uppgávum. Tú verður ikki tengdur/tengd at eini ávísari patrulju. Tú verður ein "handy-scout", sum hjálpir til, tá tað krevst. Tú verður tó ein líka stórur partur av race'inum sum ein og hvør leiðari, orsaka av at vit øll fylgjast fyri tað mesta gjøgnum alt race'ið.

**Krøv til luttakandi ISTarar:**

**Aldur:** Tú ert 18+

**Konditión:** Nordic Adventure Race er eitt avbjóðandi race, so tú skalt hava hampuliga góða konditión. Vit ganga nógv – og ferðast nógv í fjøllunum – og tú skalt bera egnan ryggsekk, umframt felags útgerð.
Ein pakkilisti verður givin seinni.

**Prísur:** Sum ISTari skalt tú einki gjalda, tí tín innsatsur er betaling nokk. ☺

## Info til leiðarar:

Sum leiðari á hesum fyrsta spennandi Nordic Adventure Race í Føroyum verður tú ein partur av tí stóra norðurlendska felagsskapinum og verður vónandi fleiri góðar upplivingar ríkari.

Á Nordic Adventure Race eru patruljurnar blandaðar, har tær ymsu mentaninar møtast í spennandi avbjóðingum og har samskifti og samstarv eru avgerandi fyri sigrinum hjá patruljuni.
Tú fært ábyrgdina av 1 patrulju og fylgist við teimum á race'inum. Øll fylgjast fyri tað mesta og tí verður tú eisini saman við øðrum leiðarum, ISTarum og skótum.

**Krøv til leiðarar:**

**Aldur:** Tú ert 18+

**Konditión:** Nordic Adventure Race er eitt avbjóðandi race, so tú skalt hava hampuliga góða konditión. Vit ganga nógv – og ferðast nógv í fjøllunum – og tú skalt bera egnan ryggsekk, umframt felags útgerð.
Ein pakkilisti verður givin seinni.

**Prísur:** Sum ISTari skalt tú einki gjalda, tí tín innsatsur er betaling nokk. ☺